# Eg leggi kongin!

PÁLL Á REYNATÚGVU
borgarstjóri á Sandi



Eftir at hava tosað við familjuna hjá mær um vikuskiftið, eri eg komin til ta niðurstøðu, at frægast er fyri okkum øll, um eg gevist sum borgarstjóri í Sands Kommunu. Kenni meg ikki sekan í teimum ákærum, sum eru settar móti mær, men kann ikki liva við, at familjan eg havi kær, ferð aftan á ferð verður drigin gjøgnum fjølmiðlakvørnina saman við mínum politiska persóni. Vit orka snøgt sagt ikki meira.

Ei heldur er tað rímiligt, at Sandbygd ferð aftan á ferð verður fjølmiðlastemplað sum eitt klandurshol. Veruleikin er, at her er eitt paradís at búgva hjá teimum flestu, og havi eg kent tað sum ein heiður at staðið á odda fyri menningini av kommununi seinastu átta árini.

Hóast ógvuliga truplar fortreytir, so hevur eydnast okkum sum búgva her, at ment bygdina munandi hesi árini. Mest ítøkiligu úrslitini eru nýggi barnaskúlin, nýggja kommunuskrivstovan, og slóðanin fyri ítróttarhøllini. Uttan framúr sandsvinir høvdu vit ikki reist nýggja bókasavnið og listasavnið. At skuldin í sama tíðarskeiði er goldin úr 40 milliónum niður í 23 er somuleiðis nøktandi.

Til mínar góðu politisku starvsfelagar, stillarar og mínar trúgvu veljarar, kann eg bert siga, at eg eri ómetaliga harmur, men vóni at tit skilja støðuna hjá mær og familjuni.

Kenni at eg havi givið alt tað, sum eg dugi og orki í royndini at menna bygdina til ein liviligari stað og eri sannførdur um, at tey úrslit, vit hava skapt saman, við tíðini gerast størri enn vit geva okkum far um í dag.

Vónaði til tað síðsta, at úrslitið á kommunuvalinum og breiða samstarvið í kommunustýrinum, fór at kunna sameina bygdina aftur, men so tykist ikki vera.

Ongin persónur er oman fyri felagsskapin, og tað er tí í vónini um, at sjógvarnir slættast, og at bygdin finnur stevið framá, at eg leggi frá mær.

Skal eg koma við einum boði upp á komandi borgarstjóran á Sandi, so verður tað Olga Fossdalsá. Á tann hátt hevði veljarans tala fyri virðunum á Lista C hóast alt vunnið frama.

Avgerðin verður framd í verki á einum komandi kommunustýrisfundi.

# Hvussu skilja vit veljarakanningar

ARNE WINTHEREIG

**Unga Tjóðveldi undrast í grein á, at javnarveljarar fara frá einum sosialdemokratiskum flokki yvir í ein borgarligan flokk. Ungmannafelagið Samband hevur hesa frágreiðing**

Meðan Unga Tjóðveldi í grein í vikuni undrast á úrslitið av veljarakanningini, ið vísir, at Javnaðarflokkurin gongur nógv aftur og Sambandsflokkurin er stóri vinnarin, heldur Ungmannafelagið Samband slett ikki, at hetta er nakað at undrast á. Tí Sambandsflokkurin, ið er einasti flokkur á tingi, ið 100 % vil virka fyri einum Ríkisfelagsskapi, hevur tann tryggleika, sum Javnaðarflokkurin og Tjóðveldi ikki kunnu hava.

Eg eri samdur við Unga Tjóðveldi, at Javnaðarflokkurin ikki hevur ein miðvísan politik og úrslitið av veljarakanningini vísir, at tað hevur Tjóðveldi heldur ikki. Tí síggja vit, at tað er Sambandsflokkurin, ið gongur fram og ikki Tjóðveldi.

Trygdin liggur í ríkisfelagsskapinum

Hetta er púra rætt - tað er ikki ein spurningur um ideologiska tryggleikan – men um búskaparliga tryggleikan, sum er grundarlagið í einumhvørjum vælferðarsamfelagi, og sum bert fæst gjøgnum ríkisfelagsskapin. Enn hava vit ikki hoyrt um nakran búskaparligan tryggleika í loysingarpakkanum, og hetta hava javnaðarveljarar sæð.

Unga Tjóðveldi kann kallað henda tryggleika fyri status quo, men fyri okkum sambandsfólk hevur tað í hesum døgum so stóran týdning at hava tryggleikan hjá tí einstaka í hásæti, at hvussu tað verður kallað ongan týðning hevur fyri okkum. Hetta hevur stórur partur av veljarunum eisini sæð.

Men fyri okkum, eitur hetta sambandspolitikkur.

# ABC setti brúkaraumboðið á stovn

EYÐGUNN SAMUELSEN
løgtingskvinna



Í vikuni var almenn móttøka í Vági fyri at hátíðarhalda, at brúkaraumboðið er farið til verka. Tað kennist margháttligt at lesa heilsanina frá Bjørt Samuelsen í miðlunum, har endamálið er at gera brúkaraumboðið til eitt hjartabarn hjá Tjóðveldinum.

Bjørt Samuelsen legði lógina um brúkaraumboðið fyri løgtingið, men soleiðis at brúkaraumboðið ikki bleiv sett á stovn fyrr enn 1. januar 2009, tí ongin fígging fylgdi við lógaruppskotinum. Hetta at senda ballónir upp, har fíggingin skal koma aftaná, og síðan føra fram, at tey hava loyst málið, er Tjóðveldi so líkt. Eitt gott dømi um hetta er skúladepilin við Marknagil, har tey løgdu lógina fram, og so høvdu tey loyst málið. Hóast ongin fíggingarútgreining var við.

ABD andstøðan vildi ikki hava brúkaraumboðið og legði sama uppskot framaftur, men CHE samgongan samtykti lógina, sigur Bjørt, og hetta er rætt. Tá ið fíggjarlógin fyri 2009 kom fyri tingið, var ABC samgongan endurstovnað, og tað var hon, ið samtykti fíggingina av brúkaraumboðnum, so stovnurin kundi gerast veruleiki.

Haldi ikki nøkur orsøk er at gera brúkaraumboðið til eitt partapolitiskt mál, sum Bjørt Samuelsen ger, men felagsnevnarin millum CHE og ABC er Javnaðarflokkurin. Hóast vit ongantíð hava lagt í at gera hetta málið partapolitiskt, so fegnast vit um, at vit fingu ABC at samtykkja játtanina til brúkaraumboðið. Vit ynskja øllum Føroya fólki tillukku við, at vit nú hava fingið eitt brúkaraumboð.

Eftir stendur nú at fáa útbygt skipanina við eini brúkarakærunevnd. Hetta átakið fær fullan stuðul frá Javnaðarflokkinum, og vilja vit gera okkara til, at brúkarakærunevndin, eins og brúkaraumboðið, verður veruleiki.

# Tá familjur gráta blóð um síni børn

MAUD WANG HANSEN



**At eiga barn við breki**

Tá ein mamma eigur eitt barn við breki, er tað ein stór sorg, hendan mamman og øll hennara familja skal ígjøgnum. Ein tíð við hugsanum sum: »Hvat havi eg gjørt galið?«, »Hví eg?« og »Hvat nú?«

Mammur, sum eiga normal børn, kunnu gleðast frá fyrsta degi um allar 10 fingrar og 10 tær, um eyguni, sum eru so djúp og fylgja mammuni støðugt.

Mamman, sum eigur eitt barn við breki, frøist eisini um barnið, hon hevur átt, tó skugga tungu tankarnir um, hvussu barnið fer at klára seg. Fer tað at kenna meg, fer tað at kunna ganga, lesa, ganga í skúla, fer tað at fáa vinir, skal barnið á stovn, sleppur barnið at vera í Føroyum og fáa neyðugu hjálpina, hvussu leingi fer barnið at liva?????

Ein meldur av tonkum, sum bert partvís kunnu svarast, og sjáldan beinanvegin. Mamman og familjan fáa boðið hjálp og vegleiðing frá serkønum ella sálarfrøðingi. Og vónin veksur aftur við barninum. Tað fyrsta smílið, tað fyrsta fetið, tað fyrsta orðið, tann fyrsti skúladagurin og so framvegis. Tíðin gongur skjótt, og børn vaksa skjótt, alt ov skjótt, halda summar mammur.

**Børnini ov skjótt vaksin**

Hví halda vit, at tey vaksa ov skjótt? Kanska tí vit vita, at so mugu vit sleppa teimum. Tá tey velja eina skúlaleið langt heiman ella fara at fjakka ella eitthvørt annað, sum altjóða heimurin býður teim ungu í dag.

Soleiðis er tað ikki altíð við teimum ungu, ið bera okkurt brek. Summi fáa onga vanliga skúlagongd, summi flyta á stovn sum børn, og summi flyta av landinum, tí eingi tilboð eru til tey her í Føroyum. Summi flyta í sambýli saman við øðrum, sum bera brek, og summi flyta heim aftur til mammu og pápa. Hví?

**Familjan syndrast**

Tey, sum hava fingið játtað eitthvørt viðgerðar- ella skúlatilboð í Danmark, flyta onkuntíð einsamøll, og onkuntíð flytur øll familjan. Tað er ikki altíð lætt at taka avgerð um, at øll familjan skal flyta av landinum. Tað kann vera vegna arbeiði, hús og jørð, onnur systkin ella gomul avvarðandi, sum mugu hava hjálp frá egnari familju, og so eru tað tey, sum hava onnur børn við breki. Í Føroyum eru tað lutfalsliga nógvar familjur við fleiri børnum við breki. Hetta kemst av okkara næru familjubondum. Hvat ger tann mamman, sum ikki bert hevur seg og sítt eina barna at hugsa um?

Tíverri fer familjan ofta í tvíningar, tað er ein sannroynd, og mamman flytur av landinum við barninum í teirri vón, at barnið fær hjálp.

Fá kunnu ímynda sær støðuna at taka í sovorðnum førum. Um støða er tikin til, at eitt barn flytur av landinum, er tað aftur ein stór og tung avgerð at taka, tengd at eini sorg og einum skilnaði, sum ikki ber til at seta orð á her. Oftast lagar tað seg so, at tá barnið, sum er flutt frá sínum kæru, fær ta hjálp, tí tørvar, so vaksa gleðin og vónin aftur. Tann tunga avgerðin kennist røtt, so skjótt tekin eru um, at barnið trívist og menninst í nýggja umhvørvinum. Høvdu tilboð verið tøk í Føroyum, sum kundu givið hesum útisetabørnum røttu menning, so er eingin ivi um, at so fluttu børnini ikki av landinum, heldur ikki familljur teirra ella partar av henni. Men her eru ikki nøktandi tilboð.

**Lagnurnar handan avgerðinar**

Tí undrar tað meg stórliga í hesi stund, at landsstýriskvinnan við Almannamálum, sum veit um hesar familjurnar og lagnurnar sum eru aftanfyri, tekur eina so óumhugsaða avgerð. Avgerðin um at taka hesi børn aftur til Føroya nú, er tikin fyri at spara pening, verður sagt. Tað er út av lagi illa umhugsað, at einki tilboð fyrst er fingið til vega í Føroyum. Hugsið tykkum, at hesi somu børn og familjur umaftur skulu ígjøgnum eina tíð við manglandi skúlatiboðum ella menningartilboðum av ymiskum slag. Børnini mugu vera heima, tí eingin stuðul verður settur í løtuni vegna setanarsteðg. Kanska mugu foreldrini aftur siga sítt arbeiði frá sær fyri at kunna vera um sítt barn. Kanska orka tey ikki hesa uppgávuna.

Eyðkenni hjá fleiri av her umrøddu børnum eru, at tey eru kedd, taka seg inn í seg sjálvi, hava ikki vinir, hava einki at takast við, og tíðin kennist long og innantóm. Summi eru hyperaktiv og koma út í misbrúk og kriminalitet. Ótti breiður seg við tíðini; børn sum skaða seg sjálvi, og børn, sum ikki orka ella hava hug at liva. Mammur sum ikki orka ella hava hug at liva.

**Góða landsstýriskvinna við Almannamálum**

Tak umhugsni og menniskjað fram um pengarnar og fíggjarligu atlitini. Hetta ber ikki til. Tá fólkið, sum her býr, grætur blóð, fyri at politikkarar skulu kunna byggja tunlar og vegir, tá er hetta ikki eitt land fyri øll. Hetta er ikki tað landið, okkum hóvar!